# Serstøk byggisamtykt nr. 4 fyri Tinagnes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna.

Skrá:

Tórshavnar býráð og Føroya Landsstýri hava lagt tað skrá fyri arbeiðið við eini heildarskipan fyri Tinganes og gomlu Havnina, at reglugerðin skal leggja dent á - samstundis sum nýbygt og endurbygt verður - at varðveita sum mest av tí dámi, sum hevur sermerkt hetta stað. At skipa tað nýggja á slíkan hátt, at tað ikki stríðist ímóti, men livir saman við tí virðismesta í tí gamla.

FYRITREYTIR SAMTYKTARINNAR

<u>Serstaka byggiráðið</u>

1. Serstaka byggiráðið hevur til uppgávu at vegleiða býráðið tá mál verða viðgjørd, ið koma inn undir fyriskipanir í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina og skal serstakliga viðgera allar spurningar, ið hava samband við útsjónd húsanna.

Samstundir skal serstaka byggiráðið hjálpa við leiðbeiningum tá onkur, sum vil byggja ella umæla eina ogn, ið liggur innan fyri hesa byggisamtykt, leggur fyrispurningar fyri tað.

2. Serstaka byggiráðið er skipa av 3 limum við:
umboði fyri Tórshavnar kommunu
umboði fyri Føroya Fornminnissavn/Føroya landsstýri
umboði fyri tey, sum búgva í tí øki, sum samtyktin røkkur um.

<u>Trygging av endurnýggjanini</u>

1. Innan deildarøkini A1, A2, C1, C3 og D letur kommunan fyri hálvan prís máling, ið er góðkend av serstaka byggiráðnum.

2. Fyri deildarøkið A er galdandi

a. Í sambandi við privatar umvælingar av húsum uttan rindar kommunan og landsstýrið kostnaðarmunin ímillum tað, sum er neyðugt at gera og tað, sum serliga byggiráðið heldur vera ynskjandi.

b. Til privatar umvælingar og nútímansgerð av húsum innan, veðheldur kommunan sparikassalánið fyri tiltøk, ið serstaka byggiráðið hevur viðmælt.

3. Tá ið ein ogn innan deildarøki A kemur til sølu hevur kommunan fyrsta keypsrætt. Ynskir kommunan at keypa, og verður ikki semja um prísin, verður prísurin settur av metingarnevnd landsstýrisins.

4. Kommunan og landsstýrið gera eina tíðarætlan fyri umvæling av egnum ongum og fyri endurnýggjan og umskipan av vegum, gongubreytum, almennu plantuvøkstri og ljósi.

SAMTYKTARFYRISKIPANIR

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. gr.

1. gr. ØKI SAMTYKTARINNAR.

Økið er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali I, og røkkur um tey matr. nr., ið liggja innan fyri markið, sum gongur úr Vágsbotn (gjøgnum matr. nr. 187 a og litra ae) eftir Mylnugøtu, Vaglinum (gjøgnum matr. nr. 183 og litra aa og ab), Húsagarði (gjøgnum litra x og matr. nr. 79), Bringsnagøtu (gjøgnum matr. nr. 57, 60, 66, 68 og litra u), Áarvegnum (gjøgnum litra ah og matr. nr. 17 a) til Eystaruvág, alt í Tórshavnar kommunu og um allar jarðarlutir sum eftir 1. september 1972 verða frábýttir hesum ongum.

2. gr. NÝTSLA ØKISINS

Økið verður sundurbýtt í eindirnar A1, A2, C1, C2, C3, C4, D1, D2, E og F.

Eindirnar A1 og A2: Bústaðaendamál

a. Við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, skula eindinar A1 og A2 bert verða nýtt til bústaðaendamál og byggingin skal vera einans stakhús, ið standa fyri seg.

   Á eindini kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi, ristingum ella sum við útsjónd síni ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.

b. Á hvørjari ogn kunnu bert verða bygd eini sethús til eitt húski hvørt, undantikin er eindin A2 har tað kann verða bygt eitt hús til trý húskir.
   Í A2 økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafè, matstova, handil v.m.

c. Á ognunum er loyvt at hava tílíkt virki, sum vanliga verða útint í eldri bústaða- og handverkaraøkjum, tá ið býráðið heldur, at tað kann verða rikið uttan at broyta eyðkenni økisins sum bústaðaøki, ella at virkið krevur rúmd at seta bilar á, sum ognin ikki hevur.

   Annars er á ognunum ikki loyvt at byggja til ella útinna handils-, bilkoyringar-, verksmiðju- ella goymsluvirki.

d. Út um tað, sum omanfyri er fyriskipað, kann býráðið loyva, at hús verða bygd ella innrættaði til felagsnýtslu, eitt nú fundarrúm og tílíkt, og til einstakar smáhandlar sum til dømis útsølubúðir í sambandi við handverkaravirki.

Eindirnar C: Almenn endamál og bústaðarendamál

Eindirnar C1, C2, C3 og C4 kunnu bert verða nýttar til almenn endamál, C3 og C4 tó eisini til bústaðarendamál.

C1. Høvuðsbygningurin er friaður og skal varðveitast sum bókahandil ella annað slag av smásøluhandli. Urtagarðurin skal varðveitast og skal, tá eigarin ynskir tað, latast kommununi fyri endurgjald, og skal hann tá skipast sum almennur urtagarður.

Ognin má ikki uttan serstakt loyvi frá býráðnum seljast uttan til kommununa.

C2. verður lagt til kirkju og kirkjugarð.

C3. verður lagt til minni stovnar og bústaðarendamál.

C4. verður lagt til almennar stovnar, skrivstovur og bústaðarendamál.

Eindirnar D: Vinnulívsendamál

a. Eindirnar D1 og D2 skulu við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, einans verða nýttar til vinnulívsendamál og byggingin skal vera kannað skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serstakliga tilíkum,ið hevur við havnina og fiskivinnuu at gera. Eisini kann býráðið loyva at byggingin verður nýtt til goymslur og pakkhús. Uttandura goymslur kunnu bert verða gjørdar við serloyvi frá býráðnum.

b. Í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir.

c. Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.

d. Í D1 økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafè, matstova, handil v.m.

Eindin E: Reynagarður

a. Nýtslan av eindini E verður avgjørd í samráði millum landsstýrið og serstaka byggiráðið.

Eindin F: Neystaøki

a. Eindin F skal nýtast til neyst til frítíðar- og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera.

3. gr. VEGIR

a. Lendi verður avlagt til hesar vegir, ið ganga sum sýnt á viðfesta fylgiskjali I

Gøturnar Bryggjubakki, Rektaragøta og Gongin verða víðkaðar og umskipaðar á strekkinum a-b so at tær har tað er gjørligt, verða til breiddar 6,0 m. Vegbreytin verður gjørd sum sýnt er á fylgikjali II.

b. Lendi verður avlagt til bilpláss samsvarandi tí, ið sýnt er á fylgiskjali I.

c. Høvuðsgongubreytir verða lagdar sum sýnt er á fylgiskjali I og skulu verða til breiddar upp til 3 m.

Breytirnar verða gjørdar sum sýnt er á fylgiskjali II.

4. gr. ÚTSTYKKINGAR

a. Útstykkingar innan eind A kunnu bert verða gjørdar, tá býráðið hevur góðkent útstykkingarætlan fyri ett ella fleiri matr. nr.

Grundstykkini skulu verða til víddar millum 100 og 250 m². Aftaná møguliga samanlegging má einki øki vera meira enn 250 m²
til víddar.

Skal nýbyggjast á eini ogn, ið er størri enn 250 m² til víddar, so skal útstykking fara fram, áðrenn bygt verður.

b. Ikki kann verða útstykkjað innan eindirnar C1, C2, C3 og C4.

c. Útstykkingar og markbroytingar í eindunum D1 og D2 skulu í høvuðseitinum samsvara við tað, sum sýnt er á fylgiskjali IV.

d. Innan eindina E kann ikki verða útstykkjað.

5. <u>gr. STØDD OG STAÐSETING HÚSANNA O.A.</u>

<u>Eind A1</u>

a. Dámurin í hesum øki skal varðveitast mest møguligt, hvat ið viðvíkur byggihátti, húsastøddum, gróðuri o.ø. Serstakan týdning hevur hetta fyri teir partar, sum strikumerktir á fylgiskjali I.

b. Byggistigið kann fyri ognir upp til 100 m² ikki fara upp um 0,8. Á ognum millum 100 og 160 m² kann ikki verða bygt meira enn 80 m² í umvídd og fyri ognir millum 160 og 250 m² kann byggistigið ikki fara upp um 0,5

c. Tá endurbygt verður skal, um tað er gjørligt, byggjast við somu umvídd og á sama stað sum tey niðurtiknu húsini.

d. Tá bygt verður uppí, skal fyriskipanin í b. haldast.

e. Tvey hús kunnu verða samanløgd við einum bygningi ímillum, tá ið hesin í mesta lagi er 5 m til longdar, og tá ið hann verður hildin í minsta lagi 0,5 m frá húsahornum.

f. Hús kunnu ikki gerast við meria enn einari hædd og nýttum loftir umframt kjallara,

g. Stovugólv kann í mesta lagi vera 0,4 m yvir hægsta jørildi við húsahorn.

Yvirsyll skal ikki vera hægri enn 2,60 m frá stovugólvi.

h. Húsini skulu hava vanliga reising við skjøldrum. Reisingin skal verða ímillum 30° og 45° reyst.

i. Ikki er loyvt at byggja bilskúrar á ognunum.

k. Úthús og onnur tílík smáhús skulu ikki vera størri í vídd enn 10 m².

l. Hús til bústaðir skulu ikki standa grannamarki nærri enn 2m ella nærrri øðrum húsum enn 4 m uttan so, at húsasíður millum bygningarnar eru úr tilfari, ið ikki tekur við eld.

m. Leiðingarløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum er sýnd á fylgiskjali III, ið liggur til skjals á býarverkfrøðingarskrivstovuni.

Eind A2

a. Dámurin í hesum øki skal varðveitast mest møguligt, hvat ið viðvíkur byggihátti, húsastøddum, gróðuri o.ø. Serstakan týdning hevur hetta fyri teir partar, sum strikumerktir á fylgiskjali I.

b. Byggistigið kann ikki fara upp um 0,53 umframt 5 $m^2$ teknikrúm í kjallara, sum bert kann nýtast í tí parti av kjallara ið er undir jørð. Nýtslustigið kann ikki fara upp um 2,16

c. Tá endurbygt verður skal, um tað er gjørligt, byggjast við somu umvídd og á sama stað sum tey niðurtiknu húsini.

d. Tá bygt verður uppí, skal fyriskipanin í b. haldast.

e. Húsini kunnu ikki gerast við meria enn trimum hæddum umframt kjallara. Hartil kunnu húsini bert gerast við sløttum takið við rekkverk omaná.

Hægsta punkt við útvegg má ikki vera hægri enn 12 m, tað er frá yvirkant kjallaragólvi til yvirkant tekju umframt rekkverk á tekjuni.

h. Ikki er loyvt at byggja bilskúrar á ognini.

k. Úthús og onnur tílík smáhús skulu ikki vera størri í vídd enn 10 m².

l. Hús til bústaðir skulu ikki standa grannamarki nærri enn 2m ella nærri øðrum húsum enn 4 m uttan so, at húsasíður millum bygningarnar eru úr tilfari, ið ikki tekur við eld.

m. Leiðingarløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina,sum er sýnd á fylgiskjali III, ið liggur til skjals á býarverkfrøðingar skrivstovuni.

Eindirnar C

a. Í eind C1 kann ikki verða nýbygt
b. Í eind C2 kann bert verða bygt eftir eini heildarbyggiskipan fyri alla eindina.
c. Í eind C3 kann bert verða bygt eftir eini heildarbyggiskipan fyri alla eindina.
d. Í eind C4 kann bert verða broytt, umbygt ella nýbygt eftir eini heildarbyggiskipan fyri alla eindina. Tó kann verða bygt eftir endaligum byggiskipanum fyri partar av eindini C4 um hesar samsvara við eina vegleiðandi heildarbyggiskipan fyri alla eindina.

Eindirnar D

a. Byggingin skal verða løgd í tey á fylgiskjali IV strikumerktu byggiøkini og skulu bygningarnar innan byggiøkini verða samanbygdir. Byggiøkini skulu, er tað gjørligt, byggjast fult.
b. Í eindini D1 skal hæddin á bygningum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgringina (har húsasíðan og tak koma saman, skjøldrar ikki íroknaðir) ikki vera minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.

c. Í eindini D2 skal hæddin á bygningum, roknað frá bryggjuni til yvirgrindina ikki vera meira enn 9 m.

d. Í eindini D1 skulu yvirgrindir og mønur vera javnfjarar við vegin a-b. Í báðum endunum D skal reisingin vera ímillum 30° og 45° reyst. Loyvt er at seta kvistar um so er at teir samsvara við vegleiðandi skurðir, sum sýndir eru á fylgiskjali IV.

e. Ikki er loyvt á ognunum at byggja bilskúrar, úthús og onnur lílík smáhús.

f. Leiðingaløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum sýnd er á fylgiskjali III, ið er til skjals á býarverkfrøðingarskrivstovuni.

Eindin E

Bygningin skal varðveitast og endurnýggjast eftir reglum settar av landsstýrinum í samráði við serstaka byggiráið.

6. gr. ÚTSJÓND HÚSANNA

a. Uttan í eindunum D skulu skelti og aðrar lýsingar ikki vera til sjóndar á ognunum.

Henda regla er tó ikki galdandi fyri tær ognir, sum sambært 2. gr. petti d. hava loyvi at útinna virki. Á hesum ongum skal í hvørjum einstakum føri fáast serloyvi til lýsingar. Allar lýsingar, eisini í eindunum D skulu vera góðkendar av serstaka byggiráðnum.

b. Í eindunum C og E skulu húsasíður og skjøldrar verða úr viði ella klæddar við viði.

Tekjur skulu vera myrkar ella flagaðar.

Eru rútir størri enn 0,25 m² í glasvídd, skulu teir býtast sundur við sprossum.

Til klædning, vindeygu og hurðar skulu bert nýtast litir, ið eru góðkendir av serstaka byggiráðnum.

c. Í eindunum A1 og A2 skulu framsíður og skjøldrar verða úr viði ella klæddir annaðhvørt við viði ella við rukkuplátum, ið serstaka byggiráðið hevur góðkent.

Verða sett nýggj vindeygu í gomul hús, skulu einstøku rútirnir ikki verða størri enn 0,25 m² í glasvídd.

d. Í eindunum A1, A2, C1, C2, C4 og E skulu húsagrundir vera svartar, hvítar ella ósmurdar og verða stoyptar ella laðaðar av gróti.

e. Í eindunum D1 og D2 skulu til framsíður, skjøldrar og tekjur ikki nýtast litir og tilfar, ið eftir meting serstaka byggiráðsins kann lýta økið.

7. gr. HVUSSU HALDAS SKAL BYGGISAMTYKTINA

Áðrenn farið verður undir at byggja ella broyta fyrrverandi nýtslu av eini ogn, skulu fyri býráðið verða lagdar tekningar, ið sýna grundirnar og umhvørvi hennara, og hvussu húsini standa á grundini, støðd teirra, snið og innrøtting, eins og upplýsingar skulu verða givnar um, hvat húsini og grundin ætlast nýtt til, so at býráðið kann ansa eftir, at gjørt verður eftir byggisamtyktini.

8. gr. BYGGING IÐ TIL ER

Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi løglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við løgligari nýtslu av eini ogn. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglum í byggisamtyktini.

9. gr. BYGGINGARMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

10. gr. BROT MÓTI BYGGISAMTYKTINI

Revsing fyri brot móti hesi byggisamtykt, rættargangur í máli um tilík brot, broyting av óløgligum standi og hjálp frá løgregluni við hesum verður sum fastsett í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. Mai 1954, 22. gr.

Henda grein verður avloyst av ásetingunum í almennar byggisamtykt, tá ið slík samtykt góðkend av landsstýrinum er komin í gildi.

11. gr. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur býarpartsins, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, verður ikki broyttur av reirri orsøk.

Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

6. gr. ÁGÁVA

Ágáva fyri viðgerð byggingarmyndugleika av byggimálum o.ø. verður ásett av býráðnum og góðkend av landsstýrinum.

Henda grein verður avloyst av ásetingum í almennari byggisamtykt, tá ið slík samtykt góðkend av landsstýrinum er komin í gildi.

Soleiðis samtykt at Tórshavnar býráð.
Tórshavn 25. septeber 1972

Hetta uppskot til serstaka byggisamtykt nr. 4 fyri ein part av Tórshavnar kommunu, samtykt Tórshavnar býráð, verður góðkend við heimild í 4. gr., 1. parti í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954. Føroya Landsstýri 25. mars 1973.

**VIÐMERKINGAR TIL BYGGISAMTYKTINA**

Fyri at gera tað lættari at skilja fyriskipanirnar í byggisamtyktini verða her gjørdar nakrar viðmerkingar til summar reglur í henni.
Tekningarnar eru ætlaðar bæði at lýsa tøl, ið nevnd eru í samtyktini, og at geva nøkur dømi um, havt reglurnar bera við sær, og hvussu tær kunnu verða nýttar.

Til 3. gr. <u>VEGIR</u>

Vegir og gongubreytir verða lagdar sum sýnt á fylgiskjali I og við skapi sum sýnt á fylgiskjali II.

Í einum gomlum býarparti, har talan er um at varðveita ein eyðkendan dám, er ikki gjørligt at skipa ferðslu- og bilviðurskiftini eftir teimum reglum, sum eru yndkilihst í nýbygdum býarpørtum. Teir vegir, ið til eru, hava ongantíð verði ætlaðir ferðslu av nútímans stødd og skuldu teir umskipast til at kunna taka slíka ferðslu, hevði tað borið við sær niðurtøku av stórum parti av verandi bygginginí.
Møguleiki er fyri at finna eina rímuliga loysn, og tí er ein tann týdningarmesti parturin í arbeiðinum við øllum økinum at skipa vegir og gongurbreytir eftir eini heildarætlan, sum eisini viðgerð steinseting, gróður, gøtuljós o.a.

<u>Vegur</u>: Fylgiskjal I sýnur ein-vendan bilveg, sum gingur Bryggjubakka og Rektaragøt yvir í sunnara part av Gongini. Av fylgiskjali II sæst, at roknað er við eini koyribreyt, sum er 3 m breið, og fram við henni eini breyt, 2,5 m breið, til parkeringar.

Neyðugt verður at taka av summum ognum fyri at kunna fáa fullu breiddina av ætlaða vegnum, men í fyrstu syftu er gjørligt at bíða við parkeringsbreytini, og kann tá koyribreytin gerast uttan stórvegis reguleringar.



<u>Gongubreytir</u>: Ein høvuðsbreyt gongur av Vaglinum eftir øllum rygginum heilt út í Tinganes. Frá hesi høvuðsbreyt ganga smærri tvørbreytir omanav hvørju megin. Breytirnar verða lagdar við gróti ella við stoyptum flísum við grasi ímillum og uttanum, styrkt við smásteinum ella grovum grúsi. Sostatt verður gjørligt hjá bili (sløkkiliðs- , sjúkrabili o.ø.) at koma til flest øll hús.

Bilpláss: Einvendi bilvegurin gevur atgongd og parkering fyri bilar til alt miðøkið. Tilkoyring til eindirnar D1 og D2 fram við Vestaruvág og Eystaruvág má skipast frá bryggjuøkjunum, har fitt av bilum fáa verið.
Verða eisini partar av niðastu hædd í bygginginí nýttir til bilpláss, kann fáast ein rímilig støðd av parkeringsøki.

Húsini úti í Tinganesi (eind C4) skulu í høvuðsheitinum hava tilkoyring frá báðum bryggjunum móti Eystaru- og Vestaruvág. Møguleikarnir fyri bilplássini eru smáir, men við nýbygging av lendinum norðanfyri Munkastovuna kann skipast fyri nøkrum bilplássum á bryggjuøkinum og í niðastu húsahæddini.

til 2. gr. Eindinar A1 og A2

og 5. gr.

Tá einstakir handlar og verkstaðir verða undantiknir so er hetta økið, sum tað liggur í dag, eitt reint bústaðarøki, og lítil ivi er um at tað eigur at varðveitast sum slíkt, bæði tí at familjulívið í húsunum gjøgnum tíðirnar hava verið eins týðandi sermerki fyri gamla býin og húsini sjálv, og tí at hetta kann tryggja at økið ikki liggur oyði og deytt aftan á arbeiðstíð.

Men tey nógvu húsini eru ov smá til eina nútíðarhóskandi familjuíbúð, tekniska útgerðin er vánalig og fleiri av teimum eru illa røkt. Í 5. gr. undir eind A1 og A2, petti a-m eru settar reglur, sum royna av varðveita dám og støddir, samstundis sum tær geva møguleikar at innrætta rímiligar bústaðir, annaðhvørt við at umvæla verandi hús ella við at byggja av nýggjum.

til 5. gr. Eindirnar A1 og A2, petti b.

Byggistigið fyri ognir upp til 100 m² í vídd kann ikki fara upp um 0,8 og fyri ognir millum 100 og 250 kann tað ikki fara upp um 0,5. Undantikið fyri ognina í eind A2, har tað ikki kann fara upp um 0,53.

Hetta merkir. at er eitt grundstykki til dømis 80 m². so kunnu byggjast eini hús við 64 m² í umvídd. Er loftið nýtt verður hetta eini hús við 110 m² í gólvvídd og er afturat hesum møguleiki fyri kjallara og úthús, so kann fáast ein hóskiligur bústaður fyri eitt húski. Er grundstykkið 150 m² hevur hetta møguleika fyri einum húsi sum er 75 m² í umvídd. Er loftið nýtt fæst umleið 125 m² í gólvvídd.

Eind A, þetti e

Samanbygging av tveimum húsum.



Ein slík samanbygging gevur eina størri íbúð uttan at byggingin fær støddir, ið ikki samsvara við tað, sum er vanligt í økinum.

Eind A. þettini f., gr., h. og i.





Tekningarnar sýna dømi um hús, sum hvat viðvíkur gólvvídd, tekjusniði og hæddum er í samsvari við reglurnar í samtyktini.

til 5. gr. Eind C4 Tinganes

Flest allir bygningar eru friðaðir, so ikki er bráneyðugt við nágreiniligari samtyktarreglum.

Áðrenn nýbygt verður, skal gerast ein heildarbyggiætlan fyri alt økið. Í 1971 var ein fyribils kanna gjørd av møguleikunum fyri at nýta verandi bygningarnar í Tinganesi saman við nýbygging á toftunum, har tað brendi, til skrivstovur hjá landsstýrinum og landsumsitingini. Eisini varð kannaður møglueikin at seta nýggju løgtingshúsini á økið norðanfyri gamla kirkjugarðin.

Eingin avgerð er tikin um hetta, í samtyktini stendur spurningurin opin við teirri fyriskipan, at økið skal vera til taks til almennar stovnar og skrivstovur.



Skitsuuppskot frá 1971, sum sýnir eina møguliga sraðseting av nýggjum løgtingshúsum og nýbygging á toftunum.

til 5. gr. Eindirnar D1 og D2

Byggingin ímóti Vestaruvág, er, sum hon liggur ídag bæði spjadd og tilvildarlig. Norðast ímóti Vágsbotni er ein rímilig heild á húsunum, men longur úti standa tey við hæddum og støddum og tilfari, sum ger tað heldur óruddiligt at síggja til.

Av dømum, í øðrum londum t.d. Tyske Bryggen í Bergen, vita vit hvønn týdning tað hevur fyri ein havnabý at hava eitt vakurt og heilskaða andlit út ímóti sínum havarlagi. Eitt slíkt andlit kundi Tórshavn fingið á hesum strekki, um farið var fram eftir gjølla lýstari og nágreiniligari heildarætlan, tá byggingin skal endurnýggjast, eini byggiætlan, sum skuldi borið við sær, at tey uttastu húsini vóru niðurtikin.

Fylgiskjal IV sýnir, hvussu eitt sundurbýti í byggiøki saman við vegleiðandi húsaskruðum lutvís kann tryggja eina heild einaferð í framtíðini tá tey flestu húsini eru endurnýggjaði og økið er fult útbygt.

Eind E. Reynagarður

Flestu húsini eru friðaði og verða sum frá líður endurnýggjaði og skuldi tiskil ikki verið tørvur á gjøllari reglum fyri hetta økið. Tó hevur tað týdning at avgera, hvørja nýtslu húsini skulu vera til frameftir. Sum bústaðir eru flestu húsini vorðin ov trong uttan so, at tey verða løgd saman.



Facader mod øst. Facader mod nord. Facader mod vest. Facader mod syd. Efter restaurering.



Plan af de restaurerede bygninger, 1:400. 1, butik, værksted, atelier el. lign. 2, forstue. 3, stue. 4, køkken. 5, bad. 6, toilet. 7, tvætterum. 8, kammer.

Plan og facader, mål 1:400.

Uppskot frá kappingini í 1969 (ábyrgd Karsten Rønnov) til samanløgu og nýskipan av húsunum í Reynagarði.

Í tí kappingaruppskoti, sum vann, var skotið upp at nýta Reynagarð sum forngripasavn fyri lutir úr føroysku gerandislívinum. Eisini varð skotið upp at nýta Portugálið sum matstovu av onkrum slag.

Annar møguleiki kundi verið at nýtt húsini í sambandi við landsstýrið ella løgtingi. Her kundi verið rúm hjá løgtingsmonnum ella kanska gistingarhús til útlendsku gestir løgtingsins.

til 6. gr. Útsjónd húsanna

1. petti. Skelti og lýsingar.

Ein ovurhonds nýtsla av skeltum og lýsingum kundi brotið sundur tann dám, sum er ætlaður í gamla býnum. Endamálið við einum skelti, har ein minni handil ella eitt handverksvirki verður er baraat siga fólki frá, at her býrt tú, og her fer fram hetta ella hatta.
Gomlu handverkaraskeltini eru góð dømi um hóskandi lýsingar í so máta. Eitt skelti vinkulrætt úr húsasíðuni sæst burturfrá og nervar ikki bygningarnar.



Pettini b., c., d. og e. Tilfar og litir

Litirnir á húsinum eru í løtuni ymiskir og tilvildarligir. Marglitaða myndin í byggingini kann í summum førum vera hugalig sosum dømi eru í Havnini, til dømis í Tróndargøtu. Men Heildardámurin í gomlum føroyskum byggisniði hevur verið dimmligur; døkkir litir, sum hava hildið húsunum niður at landslagnum tjøran og flagtekjan einamest.
Myndin av Havnini kundi tá verið hendan:
Sum ein tangi út millum báðar vágirnar gamli, søguligi býurin við sínum sáttligu, hvílandi litum. Og uttanum allan vegin nýggi, vaksandi býurin við øllum sínum glitrandi og skýggjandi litum.
Eyðkent fyri gamla býin hevur eisini verið, at øll húsini stóðu við reising og við løttum sundurbýttum framsíðum á tungari grund.
Øll hesi eyðkenni er tað, ið ætlanin er at varðveita sum best við reglunum í hesi byggisamtykt.




| UMHVØRVIS - OG VINNUMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 22/15700 |
| Ætlanarskriv: | – |
| Góðkent: | 24/10 - 2022 |
| Váttað: | [signature] |

- A1 Sethúsaøki
- A2 Sethúsaøki
- C1 Almennar stovnar
- C2 Kirkjuøki
- C3 Almennar stovnar
- C4 Almennar stovnar
- D1 Handil vinna
- D2 Handil vinna
- E Reyvagarður
- F Neystaøki

# SERSTØK BYGGISAMTYKT
## Nr 4

Samtykt av Tórshavnar kommunu 25.09.1972

Seinast broytt 10.10.2022




FYLGISKJAL I — MÁT 1:500
SERSTØK BYGGISAMTYKT NR. 4
FYRI TINGANES OG GOMLU HAVNINA.
TÓRSHAVNAR KOMMUNA. 29.9.1972.
BIRTHE OG THORKEL DAHL, GUNNAR HOYDAL




FYLGISKJAL II MÁT 1:50
SERSTØK BYGGISAMTYKT NR.4
FYRI TINGANES OG GOMLU HAVNINA,
TÓRSHAVNAR. KOMMUNA. 29-7-1972
BIRTHE OG THORKEL DAHL, GUNNAR




## MERKI

- KLOAKKLEIÐING.
- VATNVEITING.
- TELEFONKABAL
- MARK SAMTYKTARINNAR
- AVMARKING AV ØKISEINDUM.
- BILVEGUR VIÐ EINVENDARI FERÐSLU.
- HØVUÐSGONGUBREYT.
- AÐRAR GONGUBREYTIR.
- BYGNINGAR IÐ TIL ERU.
- PARTAR AV EINDINI (A), HAR TAÐ HEVUR SERSTAKAN TÝDNING AT VARÐVEITA DÁMIN Í BYGGINGINI.

**TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**
BYGGI- OG BÝARSKIPANARDEILDIN

| | |
|---|---|
| Journ. nr. | 1 B |
| Tekn. nr. | O 2 |

FYLGISKJAL III
SERSTØK BYGGISAMTYKT NR. 4
FYRI TINGANES OG GOMLU HAVNINA.
TÓRSHAVNAR KOMMUNA.

MÁT 1:500

## EIND D1



MÓTI VESTARUVÁG. DØMI UM BYGGING VIÐ FULT BYGDUM BYGGIØKJUM.

## EIND D2



MÓTI EYSTARUVÁG. DØMI UM BYGGING.



FLATMYND 1:500 VIÐ BYGGIØKJUM.



FLATMYND 1:500 VIÐ BYGGIØKJUM.




D1. VEGLEIÐANDI BYGGISKURÐUR 1:200




D1, VEGLEIÐANDI BYGGISKURÐUR 1:200




D2. SKURÐUR 1:200

BYGGIØKI

VEGØKI

FYLGISKJAL NR. IV

SERSTØK BYGGISAMTYKT NR. 4
FYRI TINGANES OG GOMLU HAVNINA
TÓRSHAVNAR KOMMUNA 1-8-1972
BIRTHE & THORKEL DAHL GUNNAR HOYDAL